

*– Vit hava ikki arbeiðsorku til at avgreiða útlendingamálini skjótari og tað hava vit gjørt vart við fleiri ferðir, sigur Bergur Berg í innlendismálaráðnum*

# Útlendingamál: Vit klára ikki at halda eina forsvarliga avgreiðslutíð

**Bergur Berg, sum hevur við útlendingar at gera í innlendismálaráðnum, viðgongur, at tey klára ikki at halda eina forsvarliga avgreiðslutíð**

ÚTLENDINGAMÁL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Vit klára ikki at halda eina forsvarliga avgreiðslutíð í útlendingamálum.

Tað viðgongur Bergur Berg í innlendismálaráðnum, blankt.

Tað er hann, sum hevur við útlendingamál at gera í innlendismálaráðnum og hann sigur, at tað tekur alt ov langa tíð at viðgera tey útlendingamál, sum koma til ráðið.

À síðu 16 og 17 í blaðnum í dag ber til at lesa um Natashu Vukotic í Hvalba, sum nú hevur bíðað í meiri enn eitt heilt ár eftir einum ummæli úr innlendismálaráðnum í sambandi við eina umsókn um at fáa arbeiðsloyvið longt.

Bergur Berg kann ikki gera viðmerkingar til einstøk mál, tí talan er um persónlig mál.

Hann sigur kortini, at tað eru fá mál, sum taka so drúgva tíð.

– Men tað eru ólukkuliga nógv mál sum taka einar sjey mánaðir at avgreiða og støðan er avgjørt ikki nøktandi hjá teimum útlendingum, sum skulu bíða eftir svari.

## Klára ikki at arbeiða undan

Bergur Berg sigur, at í 2003 setti fútin seg í landsstýrið í sambandi við útlendingamál. Fútin metti at ov nógv loyvi vórðu givin og at summar umsóknir, sum vórðu játtaðar, vóru ov ógreiðar, so at fútin ikki fekk røkt sínar eftirlitsskyldur til fulnar.

Tá avgjørdi landsstýrið av at leggja útlendingamálini undir innlendismálaráðið.

– Útgangsstøðið í lógini er, at útlendingar fáa ikki arbeiðsloyvi í Føroyum uttan so at "væsentlige erhvervsmæssige hensyn" ella "væsentlige beskæftigelsesmæssige hensyn" tala fyri tí.

"Erhvervsmæssige hensyn" eru, tá ið talan er um, at útlendingurin hevur ein serkunnleika, sum tørvur er á í vinnuni.

"Beskæftigelsesmæssige hensyn" er tá ið talan er um, at trot er á arbeiðsmegi.

– Støðan við útlendingum var, at eitt munandi tal hevði fingið arbeiðsloyvi til ófaklært arbeiði, samstundis sum ALS sigur, at eitt munandi tal av føroyingum eru tøkir á arbeiðsmarknaðinum.

Bergur Berg sigur, at sostatt skuldi nógvir av hesum útlendingum ikki havt fingið arbeiðsloyvi í Føroyum, soleiðis sum lógin er orðað.

– Tí mælti umsitingin í innlendismálaráðnum frá, at arbeiðsloyvini vórðu longd.

Men hetta skapti til politiskt rumbul og eftir eini tíð endaði við eini semju við danir um at útlendingar, sum halda fram hjá sama arbeiðsgevara við eini nøktandi inntøku, kundi fáa arbeiðsloyvini longd.

– Men ímeðan var rúgvan av óavgreiddum umsóknum vaksin, og samstundis varð manningin í innlendismálaráðnum skerd, tá ið miðfyrisitingin varð skerd.

Bergur Berg sigur, at umsitingin boðaði frá, at hon fór ikki at megna at halda eina nøktandi avgreiðslutíð við teirri arbeiðsorku, vit hava og tað hevur umsitingin boðað frá fleiri ferðir síðani.

# Jógvan við Keldu sigur ikki meira um útlendingar

**Jógvan við Keldu hevur onga viðmerking til at tað hevur tikið eitt heilt ár hjá innlendismálaráðnum at avgreiða eina umsókn um at fáa arbeiðsloyvið longt**

ÚTLENDINGAMÁL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Eg havi ongar viðmerkingar til nakað í sambandi við útlendingar enn.

Tað sigur Jógvan við Keldu, landsstýrismaður í innlendismálaráðnum, sum hevur við útlendingar at gera.

Á síðu 16 og 17 í blaðnum í dag fortelja vit søguna um Natashu Vukotic úr Jugoslavia, sum hevur búð í Hvalba í seks ár.

Í apríl mánaði í fjør sendi hon innlendismálaráðnum umsókn um at fáa arbeiðsloyvi longt, men hóast meiri enn eitt ár er farið, hevur hon hvørki hoyrt orð ella eið aftur.

Vit ætlaðu at spyrja Jógvan við Keldu, landsstýrismann um hann heldur at tað er rætt og rímiligt at ein umsøkjari skal bíða í meiri enn eitt ár eftir at fáa eitt ummmæli úr innlendismálaráðnum upp á eina umsókn um longt arbeiðsloyvi.

Hann hevur als ongar viðmerkingar.

Hann sigur, at tað situr ein bólkur og útgreinar útlendingamálið og fyrrenn hann er liðugur, ger hann ikki fleiri viðmerk-ingar til útlendingamálið.

Hann vil heldur ikki siga um hann heldur at tað kann góðtakast at tað skal taka innlendismálaráðnum eitt heilt ár at viðgera eina umsókn.

Landsstýrismaðurin sigur, at innlendismálaráðið er í ferð við at útgreina útlendingapolitikkin og fyrrenn tað er liðugt, ger hann ikki fleiri viðmerkingar.

Hann sigur, at at útgreiningin skal stinga út í kortið, hvønn útlendingapolikk, vit skulu hava í Føroyum, um málið skal yvirtakast ella ikki, o.s.fr.

– Viðvíkjandi útlendingum er spurningurin um integratión, útbúgvingar og um, hvussu teir liva og virka saman við føroyingum.

Jógvan við Keldu heldur, at tað er er umráðandi at gera hesa útgreiningina lidna, so at vit fáa ein greiðan útlendingapolitikk.



*Jógvan við Keldu vil ikki siga um hann heldur at tað er rímiligt, at ein umsøkjari skal bíða í eittheilt ár eftir svari úr innlendismálaráðnum*